# Spáddi lutvíst rætt

**Longdin, kynið og dagurin passaði, men vektin var við síðuna av, tá føroyski clairvoyanturin Marin Súsanna Vígda um miðjan mars í Sosialinum spáddi um kongaliga arvingin**

KONGALIGT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroyski clairvoyanturin Súsanna Vígdá segði við í samrøðu við Sosialin 17. mars, at hon hevði fingið innlit í vekt, longd, kyn og part av dagfestingini, tá, tá komandi barnið hjá Mary og Frederik fór at verða føtt. Súsanna segði soleiðis:

- Mary, krúnprinsessa og Frederik, krúnprinsur fáa eina lítla prinsessu. Hon vigar umleið 2985 gram og er umleið 49-50 sentimetrar til longdar. Eg eri ikki heilt greið yvir nær tað verður, men eitt 2 tal er í dagfestingini, kanska kemur tað til mín seinni, eg skal boða tær frá, tá eg veit okkurt.

Hetta var lutvíst rætt. Talan gjørdist um eina prinsessu, og dagurin var leygardagur 21. apríl, so eitt 2 tal er í dagfestingini, eisini longdin passar. Prinsessan er 50 sentimetrar til longdar og hetta er somuleiðis rætt. Men sermerkt lága vektin, ið Súsanna spáddi, var við síðuna av. Prinsessan vigar 3350 gramm, hetta eru 365 gramm meira, enn spátt var. Men Súsanna vísti eisini á, at clairvoyanca ikki er ein presis vísind.

- Vit clairvoyantar hava ikki altíð rætt, so tað er altíð ein risiko, við at deila sína vitan við onnur, segði hon. Men sigast má, at í hesum førinum hevði hon lutvíst rætt.

Í viðmerking til portal.fo í dag, var Súsanna heldur ikki vónbrotin um, at ein av fýra spádómum var við síðuna av.

Ná trý av fýra er ikki heilt dumt, ella hvat heldur tú? Sum tað er deiligt við eini undurfullari prinsessu, sigur Súsanna.

Súsanna Vígdá er clairvoyantur, hon hevur síðan barnsbein sæð hendingar, áðrenn tær eru hendar. Súsanna er úr Fuglafirði, men hevur síðan 1986 búð í Danmark. Hon er fólkaskúlalærari, og við síðuna av hesum arbeiði, virkar hon sum clairvoyantur.

Í samrøðu í Sosialinum í fjør avdúkaði hon, at áðrenn krúnprinsaparið Mary og Frederik fingu sonin Christian, visti hon, at hetta fór at vera ein drongur. Hon visti somuleiðis, nær hann fór at verða borin í heim, bæði dagfesting og hvat klokkutíð, og júst klokkutíðin hesaferð er eisini eitt sindur áhugaverd. Lítla prinsessan varð borin í heim 16.02, her var aftur eitt 2 tal.



*- Trý av fýra er ikki so galið, heldur Súsanna Vígdá, ið spáddi um nýggju prinsessuna í Sosialinum 17. mars*
*Mynd: Símun Jóannesarson*

# Høgni Lisberg nú við livandi myndum

**Á nýggju myspace síðuni hjá Høgna Lisberg liggja livandi nú myndir av Høgna og bólkinum, ið framføra tvey løg í sjónvarpssendingini Go' Morgen Danmark**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Herfyri var myspace síðan hjá Høgna Lisberg strikað uttan ávaring og uttan frágreiðing. Men arbeiði við við at endurskapa hana gongur væl. Síðan vit á Planet.fo fyrstu ferð skrivaðu um óhepnu støðuna, hevur Høgni fingið sera nógvar áheitanir um vinskap frá fólki, og í morgun er talið av vinum komið upp á 285. Hetta er tó enn langt frá teimum 768 vinunum, ið Høgni hevði, áðrenn profilurin varð strikaður. Talið av spældum løgum er komið upp á 583 og eisini hetta er sera langt frá teimum 12.000 spældu løgunum, ið Høgni hevði, áðrenn hann var strikaður.

Høgni lovar á myspace síðuni, at geva fólki okkurt eyka hesuferð, og hetta verður millum annað gjørt við at leggja eitt eyka lag á síðuna, ið áður bert hevði 3 løg.

Nú ber til at hoyra løgini Morning Dew, Lela, Star Gazers og Learn To Ride On Waves. Men harumframt eru nú løgd sjónvarpsupptøkurnar av framførsluni hjá Høgna í morgunsendingini hjá danska TV2. Her er talan um lagið Morning Dew og tað ikki útgivna lagið Been Out Of Town. Hetta nýggja lagið er rættiliga forkunnugt. Tað ljóðar eitt sindur sum, um tað hevði ljóðað um Prince spældi Country.



*Høgni Lisberg og bólkurin eru frálíkir á konsert, nú kann hetta upplivast á alnetinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Brandur Enni á Hawaii eftir at hava verið í sjónum og svomið við grindahvalum*
*mynd: www.myspace.com/brandurenni*

# Barnastjørnan gjørdist vaksin á Hawaii

**Brandur Enni, ið ivaleyst er største barnastjørna, ið føroyingar hava átt, er vorðin vaksin. 15. apríl fylti hann 18 ár. Dagurin var hildin á Kona Island á Hawaii**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Evnaríki sangarin og sangskrivarin er í løtuni á Hawaii í tónleikaørindum, og tað bar so á, at føðingardagur hansara fall á hesa vitjan.

Hóast Brandur nú er vorðin myndugur, og sostatt ikki kemur undur lýsingina barnastjørna longur, so er stjørnuglansurin ikki horvin. Brandur luttók herfyri á AME-Reykjavík til stóran fagna frá áskoðarunum. Han arbeiðir við eini komandi útgávu og vit hava longu uppliva fleiri av løgunum av hesi útgávu. Eitt nú Aware Of It, sum var partur av sangskrivarakappingini hjá AME. Nú hevur Brandur lag eitt nýtt lag út á MySpace síðu sína http://www.myspace.com/brandurenni" myspace.com/brandurenni, lagið kallast With Or Without You

MySpace síðan hjá Brandi hevur rundað 16.000 spæld løg síðani hálvan november, ið er ímillum tey frægu spælitølini hjá føroyskum tónlistafólki, tó at tað ikki kann samanberast við eitt nú Teit, ið higartil hevur havt útvið 490.000 spæld løg, Lena, ið hevur útvið 33.000 spæld løg og Eivør við yvir 45.000 spældum løgum.